

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 06 - 2012

# Statoil fingið útleiðingarloyvi

Umhvørvisstovan gav hin 4. juni 2012 Statoil loyvi til nýtslu og burturbeining av kemikalium í sambandi við boring av leitibrunninum Brugdan II Boringin er í loyvi 006 á knattstøðu 61°1542.75 N og 04°59 48.93 V, umleið 100 km í ein landsynning úr Føroyum. Dýpið, har borað verður, er umleið 484 m. Boringin er ætlað at byrja um hálvan juni 2012 og er mett at taka í mesta lagi 131 dagar, íroknað at flyta boripallin á staðið, at bora og læsa brunnin og at flyta pallin av staðnum. Boripallurin COSL Pioneer verður nýttur til boringina. Loyvið fevnir um nýtslu og burturbeining av kemikalium, sum verða brúkt í sambandi við boringina. Í viðgerðini hevur Umhvørvisstovan lagt dent á, at tey loyvdu kemikaliini ikki eru seint niðurbrótilig í náttúruni, ikki upphópast í livandi verum og ikki eru eitrandi. Í loyvinum eru harumframt settar treytir um botnkanningar nærhendis brunninum, bæði áðrenn og aftaná boringina, um umhvørvisstýring, viðgerð av burturkasti, o.a. skrivar Umhvørvisstovan á síni heimasíðu. Mynd - Boripallurin Cosl Pioneer, sum borar í Føroyum í næstu viku. Myndatøka Torkil Hansen